# Viðjatrotið

**1.**Í Føroyum onki lag er,
nú púra onki træ er,
ei nakað sprek tú sært
og um her hevði ligið
í yvirflóð av viði,
tað sama ger, tú fært
onki hvussu fegin tú tað vildi,
tí nú sett er viðabann í gildi
Mortensen og Churchill hava hildið,
í Føroyum grót og flag "it´s not saa ilde"

**2.**Tú neyvan fært frá Nielsi,
so frægt sum pinn í pylsu,
ei minni tuflutræ
og nú eg havi traðka
mær tufflur upp í nakka,
hvat leggur Niels í tað,
Niels hann leggur púra onki í tað,
dámar kanska líka væl at sýta,
við vit hava ongan út at bíta
it vættabøk og klássur kunnu nýta

**3.**Um tráða tín er brotin,
og flaggstongin er rotin,
tað onki við tað gerst,
og leypar, hakaføtur
nú bjóða ikki bøtur,
alt virkar og forferst
ikki rimin heil í nøkrum leypi
ongin sneis at røra við í greyti
síðsta summar hakafótin breyt eg, eingin ár og
ongin áraskeyti

**4.**Tað stundum seg man hendi,
at maður seg skal kvenda
Og fáa sær eitt vív
Men viðurin er ongin,
og ongin brúðarsongin,
eitt vána brúdleypslív.
So tú setur teg at samanbjóðra
bønarsvar til Niels valutastjóra,
við tú biður, ráðborð ella hølvað,
Svarast: reiði tykkum ból á gólvi

**5.**Um nú tann gleðin hendi,
at ljósmamman tær sendi
ein fittan lítlan son,
so smíðast skal ein vøgga
at vagga við, men støðga,
ei sprek er undir lon.
So í næsta húsið vøggu læna,
Men gakk! Ein lítil skoti brúkar hana,
Mamman var í Havn hon skuldi tæna,
Har prúðkaðist hon brátt, tann moyggin væna

**6.**Brátt koma man tann dagur,
at tú, ein gamal maður,
fert hesum foldum frá,
tú leggjast skal í kistu,
men bara eg nú visti,
hvar viðurin kom frá;
aftur setist eg vum við at søkja
lovi, at tú eftir teim skalt spøkja
um teir nokta, Niels tá svarar treyður
lat fyrst mannin svørja, hann er deyður

This document was created with Win2PDF available at http://www.win2pdf.com.
The unregistered version of Win2PDF is for evaluation or non-commercial use only.
This page will not be added after purchasing Win2PDF.